**HOYVÍKAR SKÚLI**

**Skúlastýrisfundur**

Hósdagur, 07. mars 2024 kl. 16.30 – 18.00

**Á fundinum vóru:** Rannvá Mortansdóttir, Jógvan Páll Fjallsbak, Laila í Hentze, Margith Lamhauge, Anna Maria Reinert Jensen, og Malan á Dul Nielsen,

**Avboð:** Gunvør Balle, Leivur Simonsen

**Ikki møtt:** Laila í Hentze

**Fundarleiðari:** Rannvá Mortansdóttir

**Skrivari:** Malan á Dul Nielsen

1) Seinasta fundarfrásøgn – er góðkend

2) **Leiðslan kunnar**
   - Evnisvikan verður í næstu viku. Evnið verður ABC-sálarheila. Tey handaligu verkstøðini eru tey, sum fara at fylla, og tað eru tey, sum ofta fylla minst í tí gerandisliga.
   - Sosiala deild fer aftur at seta í verk at vitja skúlarnar eina ferð um mánaðin/6. hvørja viku. Hetta eru vit glað fyri. Her kann mann seta spurningar um ymiskt, mann ivast í og fáa vegleiðing.
   - Tað koma væntandi fleiri ukrainar komandi skúlaár, og sum støðan er nú er ein ukrainskur flokkur í Eysturskúlanum, og har er ikki pláss fyri fleiri, so vit kunnu vænta okkum fleiri her.

**3. Eftirmeting og viðmerkingar til fund við trivnaðarumboðini**

- Stemningurin var negativari í ár enn í fjør. Foreldraumboðini í ár vóru ikki so ivrig eftir felagstiltaki sum undanfarna ár, men funnust at ymiskum.

- FIFA vøllurin krevur ábøtur, og tað kom fram til fundin. Vit kanna, um vit fáa pengar onku staðni til vøllin, annars verður søkt frá kommununi í næsta ár, um vit kunnu fáa pengar til vøllin.
- Ferðsluviðurskiftini vórðu eisini umrødd, og har er skrivað síða upp og niður um tað, men foreldrini sakna greiða skelting. Vit hava í heyst fingið tekningar um kirkjutornið, og har er av og á skipanin eisini umhugsað. Vit bíða annars enn eftir eini heildartekning av skúlanum, sum skal undir eina ný/umbygging.
- Kreativu fakini eru við undirlutan siga foreldraumboðini, men har er ikki nógv at gera undir verandi fysisku karmum, og tímarnir strekkja ikki til.
- Foreldraumboðini sakna tiltøk, men niðurstøðan er, í flestu førum, at tað krevur nógva tíð av lærarum til summi av tiltøkunum. Annars eru vit til fleiri tiltøk uttan fyri skúlans øki, men tað er kanska væntandi kunning um tað.
- Foreldur sakna kunning um ymisk viðurskifti um sjúkrameldingar, foreldraviðtalur osv.
- Skúlatingini hanga í ein vissan mun ov nógv á foreldrunum. Tað kundi verið smart, um bøkurnar kundu komið við heim í staðin fyri at logga inn á Office.
- Serskúlatilboðið skuldi fingið eitt annað navn, og tað hevur ligið í kortunum leingi.

**4. Komandi tiltak/ fundur**

Tað kundi verið ein fundur, so kundi mann lisið ársfrágreiðingina ella eitt felagstiltak við SVL í apríl.

Fundurin lokin kl. 18:12